## Neyðlendu til fánýtis

Eitt Airbus 380 flogfar ávegis frá Dubai til New York mátti sunnudagin neyðlenda í Týskalandi, tí ein genta var vorðin sjúk umborð. 9-ára gamla pakistansk-amerikanska gentan, Tayyabah, gjørdist illa fyri og byrjaði at spýggja. Ein lækni, sum var ferðafólk umborð, ansaði eftir støðuni, sum alsamt versnaðu, og tá gentan fór í koma yvir Týskalandi sló læknin alarm. Flogfarið lendi í skundi í Erdinger Moos floghavnini í München. Men hóast gentan við tyrlu varð flutt á sjúkrahús, stóð lívið ikki at bjarga. Hon var vakt aftur til lívs fleiri ferðir, men fimm tímar seinni varð hon deyð.




## Fongurin 60 milliónir

Spekulatiónir um ránið hevur áður mett upphæddina, sum ránsmenninir sluppu avstað við í stóra ráninum móti Dansk Værdihåndtering í Brøndby, heilt upp til 200 milliónir krónur. Nú er so endaliga uppgjørt, og ránsmenninir fingu 60 milliónir krónur. Ránið móti Dansk Værdihåndtering fór fram sunnudagin, tá skortprýddir og tungt vápnaðir menntrongdu gjøgnum múrin á grannafyritøkuni við einari gummiged. Síðani stjólu teir 60 milliónir og flýddu í myrkum bilum. Hetta er næststørsta ránið í Danmark nakrantíð. Løgreglan stendur enn mest sum á berum.

# gaskipanini



*Fiski-og útróðrarmenn eru komnir til Havnar at fylgja viðgerðini á tingi um fiskidagar fyri komandi fiskiár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*»Vit eru eisini framtíðin...« siga børnini hjá fiski-og útróðrarmonnum, sum stóðu uttanfyri Tinghúsið við hesum skelti, tá tingfundurin í morgun byrjaði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stórt álvarsemi í Tinghúsinum

**»Vit eru eisini framtíðin« stóð á skelti, sum nøkur fiskimannabørn høvdu við sær, tá tingfundurin byrjaði í morgun – fundurin, sum kemur at gera av lagnuna hjá fiskidøgunum fyri komandi fiskiár**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú 2. viðgerð er á tingi í dag í málinum um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, eru nógvir útróðrar-og fiskimenn savnaðir í Havn.

Fleiri skip og bátar kring um úr landinum løgdu til bryggju í Havn í morgun. Við bátunum eru serliga útróðrarmenn, línumenn og menn, sum sigla við teimum smærru trolarunum.

Í staðin fyri at koma til Havnar í bili, eru teir komnir í bátum og skipum sínum. Teir eru komnir at fylgja viðgerðini á tingi, har løgtingið einaferð í dag fer at atkvøða um eitt nú fiskidagar fyri komandi fiskiár.

Menninir eru eisini komnir fyri at vísa løggevandi myndugleikum og fólki annars, at teir eru til – og at teir hava familjur aftanfyri seg, ið liva av tí, sum upp úr havinum kemur.

Áðrenn tingfundurin byrjaði klokkan 9.30 í morgun, høvdu teir syrgt fyri, at nøkur fiskimannabørn kundu standa uttanfyri tinghúsið við skeltinum: »Vit eru eisini framtíðin«.

### Stórt álvarsemi

Menn eru álvarsamir, tí landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Tórbjørn Jacobsen, hevur skotið upp at skerja fiskidagarnar hjá partrolaraflotanum við 20% og dagarnar hjá húkaflotanum við 50%. Aftrat hesum – og serliga fyri línu-og útróðrarflotanum – merkir uppskotið hjá landsstýrismanninum eina nógv størri skerjing enn tey 50%, tí Føroyabanki eftir uppskotinum eisini verður friðaður.

Á myndini, sum er tikin av áhoyraraplássinum í tinginum í morgum, situr onkur við hendur uppundir kinn, onkur heldur um høvdið – og onkur heldur saman hendur.

Jú, menn eru álvarsamir, tí hetta er, sum teir sjálvir siga tað, ein spurningur um lív ella deyð hjá okkara fiskiskipavinnu.

Óli M. Lassen, sum var ein av áhoyrarunum í morgun, er reiðari á línuskipinum Jákupi B og útróðrarbátinum Líðhamri.



*Teir eru álvarsamir; onkur situr við hendur upp undir kinn, onkur heldur um høvdið – og onkur heldur saman hendur. – Hetta er ein spurningur um lív ella deyð, siga fiski-og útróðrarmenn*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Sendur heim

- Eg haldi tað vera ófatiligt, tá fiskimálaráðharrin í viðmerkingum til sítt egna uppskot sigur, at tað ongar avleiðingar fer at fáa fyri fiskiflotan og samfelagið, at uppskotnu skerjingarnar í fiskidøgum verða framdar. Tórbjørn Jacobsen vísir á óbrúktar fiskidagar, men undir verandi skipan fæst ikki fatur á hesum døgum.

Óli M. Lassen heldur, at hevði ein ráðharri í øðrum landi komið við slíkum púrasta ókritiskum úttalilsum, hevði hann – og helst eisini hansara embætisfólk – verið send til hús í stundini.

Tá tingfundurin í morgun byrjaði, fekst ikki nøkur greið ábending um, hvørja leið løgtingið fer at ganga í spurninginum um áseting av fiskidøgum.

Teir, sum høvdu orðið, tosaðu mest út frá sínum tilmælum, sum umboð í vinnunevnd løgtingsins.

### Trý tilmæli

Vinnunevndin býtti seg undir viðgerðini av fiskidøgum í ein meiriluta, sum mælir til 3% niðurskurð og tveir minnilutar, sum ávikavist mæla til 10% og 20% niðurskurð í øllum veiðibólkum.

Seinni í dag, tá løgtingið fer at atkvøða undir 2. viðgerð, fæst greiði á, hvørja støðu meirilutin í løgtinginum kemur til.

